


# Vegleiðing til nýggja próvtalsstigan

MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Yvirlit

Próvtalsstigin ........ 1
Serlig eyðkenni ........ 1
Skúlin ........ 1
Lærarar og próvdómarar ........ 1
Mannagond ........ 3
Ítøkilig døming ........ 4
Tann fakliga metingin ........ 4
Felags fatan av metingarkrøvum ........ 4
Ávegis og endalig eftirmeting ........ 5
Skiftistíðin ........ 5
Næmingar ........ 5
At seta í verk ........ 6
Verksetingarætlan ........ 6
Kunning ........ 7
Evnisdagur ........ 7

# Inngangur

Nýggjar námsætlanir og próvtalsstigi komu í gildi í fólkaskúlanum 1. august 2011. Í hesum sambandi hevur Mentamálaráðið tillagað danska vegleiðing til próvtalsstigan til føroyskt. Vegleiðing er eitt gott amboð hjá leiðslum og lærarum í sambandi við, at próvtalsstigin verður tikin í nýtslu í skúlunum kring landið.

Døming er framvegis grundað á eina skikkaða, fakliga meting av samlaða avriki næmingsins. Døming eftir nýggja próvtalsstiganum skal verða grundað á eina ítøkiliga meting, sum verður gjørd við støði í ásettu førleikamálunum í lærugreinini. Avgerandi fyri nýggja próvtalsstigan er, at hann ikki kann verða nýttur óheftur av teimum førleikamálum, sum eru orðað fyri útbúgvingar og lærugreinar.

Avgerðin um at brúka nýggja próvtalsstigan er grundað á 5 krøv, nevniliga:

1. at hann skal kunna samanberast við ECTS-stigan (altjóða nýtsla)
2. at hann verður nýttur á sama hátt í allari útbúgvingarskipanini
3. at hann beinleiðis skal siga, hvussu eitt avrik stendur mát við ásettu málini í lærugreinini
4. at tað er greiður munur á próvtølunum
5. at roknast kann eitt miðaltal.

Mentamálaráðið august 2011

# Próvtalsstigin

| Próvtøl | Próvtalslýsingar | |
|---|---|---|
| 12 | framúr gott avrik | Verður givið fyri avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| 10 | sera gott avrik | Verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| 7 | gott avrik | Verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| 4 | hampiligt avrik | Verður givið fyri hampiligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl í námsætlanini í lærugreinini. |
| 02 | toluligt avrik, sum kann verða góðtikið | Verður givið fyri toluligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| 00 | ikki nøktandi avrik | Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| -3 | heilt vánaligt avrik | Verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið. |

### Serlig eyðkenni

- ✓ Færri próvtøl eru, og størri talmunur er á ávísum próvtølum
- ✓ Eitt negativt próvtal verður nýtt (-3)
- ✓ Einstøku próvtølini siga, í hvønn mun fyrisett mál eru rokkin
- ✓ Einki undantakspróvtal er (13-talið), øll próvtølini í stiganum verða nýtt
- ✓ Útgangstøðið fyri próvtalsgeving er altíð próvtalið 12
- ✓ Tá ið próvtal verður givið, skal avrikið ikki fyrst skipast inn í ein próvtalsbólk, men metast beinleiðis við atliti at førleikamálununum í lærugreinini.
- ✓ Eingin normalbýtiskurva verður gjørd í sambandi við nýggja próvtalsstigan.

## Skúlin

Umráðandi er, at skúlin fyrireikar lærarar at nýta nýggja próvtalsstigan. Skúlin eigur at skipa fyri gjølligari kunning um próvtalsstigan og og meginreglurnar fyri, hvussu hann verður nýttur. Skúlin skal harumframt tryggja sær, at lærarar fáa ta venjing, ið krevst, so at teir lýtaleyst kunnu nýta próvtølini í próvtalsstiganum.

Fremstu fortreytirnar hjá lærarum eru, at teir eru førir fyri at samhugsa próvtalsstigan og førleikamálini í einstøku lærugreinini, at teir hava eina felags fatan av, hvat krevst fyri at málini verða mett sum rokkin, og at teir eisini eru samdir um metingarkrøv fyri, í hvønn mun málini ikki eru nádd. Tað er ógvuliga umráðandi, at skúlin gevur lærarum

og próvdómarum høvi til at umrøða hesi viðurskifti væl og virðiliga.

Skúlin skal eisini at tryggja, at lærarar, próvdómarar, metingardómarar og onnur uttanhýsis starvsfólk eru væl kunnað um, hvussu próvtalsstigin verður nýttur. Harumframt skulu næmingar, foreldur, lærlingar og arbeiðsgevari teirra verða kunnað um námsætlanirnar og próvtalsstigan og sambandið teirra millum.

Skúlin skipar so fyri:

- ✓ at lærarar fáa umrøtt próvtalsstigini umframt metingarkrøv fyri, í hvønn mun málini eru nádd
- ✓ at lærarar og próvdómarar eru førir fyri at gera eina greiða tulking av málunum fyri lærugreinina
- ✓ at allar lærugreinar og allir lærarar taka lut í arbeiðinum við próvtalsstiganum
- ✓ at faklig semja er um dømingargrundarlagið í teimum ymisku lærugreinunum
- ✓ at lærarar taka støði í førleikamálunum í lærugreinini, tá ið teir gera uppgávur, royndir og próvtøkuspurningar, so teir eru førir fyri at meta um, í hvønn mun eitt avrik lýkur fyrisettu málini
- ✓ at næmingar verða kunnaðir um dømingargrundarlagið í teimum einstøku lærugreinunum og tey metingarkrøv, sum eru grundarlag undir i teimum ymisku próvtølunum
- ✓ at lærari og próvdómari á nøktandi hátt kunnu grundgeva fyri givnum próvtali
- ✓ at allir lærarar nýta nýggja próvtalsstigan, tá avrik verða dømd.

Skúlin skal ansa eftir:

- ✓ at døming verður beinleiðis grundað á førleikamál og nýggja próvtalsstigan, so próvtøl ikki fyrst verða givin við støði í 13-talsstiganum og síðani flutt yvir í nýggja próvtalsstigan
- ✓ at neyðugt orðaskifti verður millum lærarar og próvdómarar, so ikki einstaklinga tulkingar verða gjørdar viðvíkjandi førleikamálum og metingarstøði
- ✓ at allir lærarar duga at nýta próvtalsstigan og ikki bert teir lærarar, sum skulu føra næmingar upp til próvtøku.

## Lærarar og próvdómarar

Avrik verða altíð mett við støði í førleikamálunum, sum lýst eru í námsætlanini fyri lærugreinina, har próvtalið 12 verður givið fyri “avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.” Próvtølini frá 10 og niðureftir siga síðani stigvíst, hvussu avrikið í minni og minni mun lýkur málini í lærugreinini, hetta til lægsta próvtalið -3, sum verður givið fyri “heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið.”

Avgerandi fyri próvtalið, ið givið verður, er sostatt, í hvønn mun næmingurin lýkur málini, sum sett er fyri tað avrik, sum dømast skal.

Tá dømt verður, skulu lærari og próvdómari meta um bæði *dygdir* og *lýti* í avrikinum:




Sum víst við strikumyndini omanfyri, eru bæði *dygdir* og *lýti* umráðadi at hava við, tá avrik verða dømd. Tá tað snýr seg um lýti, er harumframt umráðandi at meta um *mongdina* av lýtum, og hvønn *týdning* lýtini hava í mun til ásettu førleikamálini.

Eyðkent fyri nýggja próvtalsstigan er, at hvørt próvtal hevur eitt heiti umframt próvtalslýsingar, sum siga, hvussu avrikið er útint í mun til málini. Próvtalsheitið skilar til eina stigbending, t.d. “framúr gott avrik” (12), “sera gott avrik” (10), og próvtalslýsingin sigur, í hvønn mun eitt avrik er merkt av lýtum. Eitt nú verður 12 givið fyri avrik, sum “lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst” lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini, 10 verður givið fyri avrik, ið “við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini í námsætlanini í lærugreinini” o.s.fr. Harumframt eru í hvørjari námsætlan útgreinað dømi um próvtalslýsingar fyri próvtølini 12, 7 og 02. Endamálið við hesum trimum próvtalslýsingum er at geva eina ábending um, hvussu metingarkrøvini fyri einstøk próvtøl kunnu verða lýst nærri í lærugreinini.

Fyri at kunna nýta próvtalsstigan sum ætlað, er ikki nóg mikið at kenna bygnaðin í stiganum, og hvat tey einstøku stigini merkja, t.d. at próvtalið 10 svarar til eitt “sera gott avrik”. Ymiskar fatanir kunnu vera av einstøku próvtalslýsingunum, tí bæði týdningurin og tyngdin í einstøku orðunum kunnu tulkast ymiskt. Avgerandi fyri, at próvtalsstigin verður nýttur sum ætlað, er, at stig og próvtalslýsingarnar verða sett í mun til førleikamálini, sum eitt avrik verður dømt eftir í einari lærugrein ella útbúgving.

Tá ið próvtøl verða givin fyri støðumet, avrik ella próvtøku í eini lærugrein, er grundarlagið altíð tey fakligu førleikamálini. Tað eru málini, sum siga, hvat næmingurin dugir á einum ávísum útbúgvingarstigi. Umráðandi er at hava í huga, at førleikamálini, sum lýst eru í námsætlanini fyri lærugreinina, taka støði í 12-talinum. Síðan heldur metingin fram niður ígjøgnum stigan. Próvtalið er harumframt treytað av, í hvønn mun avrikið lýkur málini við atliti at dygdum øðrumegin og lýtum og týdninginum av møguligum lýtum hinumegin.

## Mannagond

Dømingin verður gjørd við grundarlagi í hvønn mun, ásettu málini eru rokkin. Tað merkir, at lærari og próvdómari skulu:

- ✓ *fremja eina greiða tulking av førleikamálunum, sum lýst eru í kunngerðum og námsætlanum.*

  Tulkingin av førleikamálunum treytar, at ivi ikki stendst um, hvat førleikamálini í lærugreinini merkja í mun til tey stig og teir næmingar, tey eru galdandi fyri. Tulkingin treytar eisini, at skilt verður ímillum týðandi og minni týðandi tættir í sambandi við, at førleikamálini verða útint, og hvør munurin er á teimum ymisku førleikastigunum.

- ✓ *samanbera og meta um týðandi og minni týðandi tættir í førleikamálunum.*

  Dømingin fevnir í flestu førum um fleiri ella øll førleikamálini í lærugreinini. Tá ið ávíst avrik verður dømt, er ógvuliga umráðandi, at lærari og próvdómari evna at skilja ímillum meira og minni týðandi tættir í førleikamálunum.

- ✓ *hava eina greiða mynd av, hvørji metingarkrøv hava týdning fyri dømingina.*

  Fyri at meta um í hvønn mun førleikamálini eru útint, er neyðugt at gera metingarkrøv. Metingarkrøv kunnu til dømis siga meira ítøkiliga, hvat verður væntað av einum sera góðum avriki í mun til eitt ávíst uppgávusvar, og hvussu skilt verður ímillum meira og minni týðandi lýti.

- ✓ *fremja eina fakliga heildarmeting av avrikinum í mun til førleikamálini.*

  Ein døming fevnir um nógvar lutir og krevur eisini, at mett verður bæði um dygdir og lýti í avrikinum. Fyri at fremja eina skikkaða fakliga døming er tí eisini neyðugt at lærari og próvdómari evna at gera eina heildarmeting av, í hvønn mun avrikið lýkur ásettu førleikamálini.

- ✓ *evna at samanbera útint mál í einum avriki við viðkomandi próvtal á próvtalsstiganum.*

  Ein røtt døming, ið gevur próvtalið 02, er treytað av, at avrikið kann verða mett sum "toluligt, og kann verða góðtikið", og at tað "akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini" í námsætlanini. Fyri at tryggja rættvísa døming, er neyðugt, at lærarar og próvdómarar hava havt høvi at viðgera próvtalslýsingarnar í einum størri fakligum høpi, og at gjørd eru ítøkilig metingarkrøv, sum kunnu vera vegleiðandi fyri dømingina.

Umráðandi er at vita, hvat krevst, fyri at næmingurin skal fáa ávikavist 02 og 12. Neyðugt er at gera av frammanundan, hvørji minstu metingarkrøvini eru fyri, at næmingurin hevur staðið, og hvat ítøkiliga skal leggjast í orðingina "lýtaleyst ella mest sum lýtalest", um næmingurin skal fáa 12.

Henda sundurgreining av førleikamálum og stigum skal verða lætt atkomilig, bæði fyri næmingar, starvsfelagar og próvdómarar. Tað skal bera til at vísa greið dømi um, hvussu førleikamál verða rokkin, og hvørji metingarkrøv liggja sum grund fyri ávísum próvtali. Bæði næmingar og starvsfelagar skulu kunna fáa grundgeving fyri hvørjum einstøkum próvtali á stiganum.

## Ítøkilig døming

Uttan mun til um talan er um ávegis eftirmeting, støðumet ella próvtøku er meginreglan tann, at øll døming eftir nýggja próvtalsstiganum, skal vera ítøkilig. At dømingin er ítøkilig vil siga, at hon altíð fer fram við støði í teimum førleikamálum, sum eru ásett fyri viðkomandi lærugrein. Avrikið skal sostatt ikki verða dømt í mun til onnur avrik í flokkinum.

## Tann fakliga metingin

Dømingin tekur støði í, hvussu avrikið hjá næminginum stendur mát við førleikamálini fyri útbúgvingina og viðkomandi lærugrein, hvussu avrikið stendur mát við tað stigið, sum undirvíst verður á og innihaldið í lærugreinini. At døma er sum kunnugt ikki ein vísindagrein, har alt kann verða mált og vigað nágreiniliga. At døma snýr seg um at gera eina fakliga og skikkaða heildarmeting, sum merkir, at øll viðkomandi førleikamál eru havd í huga. Tó er ikki givið, at øll førleikamálini viga líka nógv, og heldur ikki er givið, at tey skulu útinnast í eins stóran mun. Skikkaða metingin tekur saman um dygdir og lýti í mun til fullint førleikamál, og ger tað møguligt at geva eitt próvtal fyri heildaravrikið.

## Felags fatan av metingarkrøvum

Umráðandi er at hava felags fatan av metingarkrøvum, og hvussu próvtalsstigin verður nýttur. Av tí at dømt verður eftir fyrisettum førleikamálum, er umráðandi, at lærari og próvdómari geva próvtal við støði í teimum metingarkrøvum og leiðreglum, sum teir koma ásamt um.

Fyri at fáa felags fatan av metingarkrøvum og leiðreglum, mugu lærarar og próvdómarar fáa høvi til at royna í verki og røða um avrik og próvtalsgeving í lærugreinunum, og hetta eigur at verða gjørt á øllum stigum í útbúgvingarskipanini. Hóskandi er at byrja í fakbólkum og lærarartoymum, og síðan at skipa samskifti millum deildir og skúlar, so felags fatan fæst í allari skúlaskipanini. Felags fatan fæst einans við støðugum fakligum orðaskifti.

Lærarar, sum undirvísa í lærugreinum, ið ikki enda við roynd ella próvtøku, sakna møguliga fortreytirnar fyri at vera við í hesum arbeiði. Tí hava fakligt orðaskifti og semja um metingarkrøvini serligan týdning.

Um próvdómari og próvhoyrari ikki eru samdir um eitt próvtal, verður roknað eitt miðaltal. Í teimum førum har miðaltalið liggur í miðjuni, er próvtalið hjá próvdómara avgerandi fyri, um miðaltalið verður rundað

upp ella niður. Royndir vísa, at ósemja um próvtal sjáldan snýr seg um, hvussu avrikið er útint við atliti at dygdum og lýtum, men heldur um, hvussu dygdir og lýti í avrikinum skulu vigast, tá ið dømt verður. Tí er umráðandi at fáa felags fatan av metingarkrøvum, og hvussu próvtalsstigin verður nýttur.

### Ávegis og endalig eftirmeting

Ávegis eftirmetingar og endaligar eftirmetingar (próvtøkur) hava til felags at lýsa støðu næmingsins í mun til ásett førleikamál. Munurin á teimum er, at ávegis eftirmetingar líta frameftir og eru støði undir undirvísingini, og endaligar eftirmetingar líta aftureftir, og eru prógv fyri lokið avrik.

Eyðkent fyri ávegis eftirmeting er, at hon skal vera við til at menna tað avrik, ið eftirmett verður. Ávegis eftirmeting skal vera samrunnin partur av undirvísingini, soleiðis at skilja, at lærari vegleiðir næmingin um, hvat hann skal gera fyri at styrkja og menna førleikar sínar.

Eyðkent fyri endaliga eftirmeting er, sum orðið sigur, at hon liggur í endanum á undirvísingini. Uttan mun til um talan er um støðumet ella próvtøkumet, skal næmingurin við avriki sínum vísa, hvat hann dugir í mun til ásett førleikamál.

Av tí at ávegis eftirmetingin eisini skal geva eina ábending um, hvat úrslitið av einari møguligari próvtøku fer at verða, skal greitt samanhang vera millum ávegis eftirmetingar og próvtøku, skilt soleiðis, at allar eftirmetingar verða gjørdar við møguligari próvtøku í huga.

### Skiftistíðin

Tá ið farið verður undir at nýta nýggja próvtalsstigan, kunnu ivamál stinga seg upp, til dømis í sambandi við ítøkiliga døming, tá ið støði verður lagt, hvussu dømt verður o.s.fr. Her skal gerast vart við, at talvan, sum gjørd er at umseta próvtøl úr 13-talsstiganum til próvtøl í nýggja próvtalsstiganum, bert verður nýtt, tá ið neyðugt er at umseta próvtøl í sambandi við at prógv verða útskrivað.

Havast skal í huga, at um ein næmingur hevur staðið eina lærurgrein eftir 13-talsstiganum, hevur hann eisini staðið eftir nýggja próvtalsstiganum.

## Næmingar

Áðrenn lærarar fara undir at brúka próvtalsstigan, er umráðandi, at næmingar hava fingið eina gjølliga kunning um próvtalsstigan, og um hvussu próvtølini verða givin. Í hesum sambandi er neyðugt at lærarin greiðir frá muninum millum 13-talsstigan og nýggja próvtalsstigan. Til dømis er eitt próvtal nú treytað av, í hvønn mun næmingurin lýkur førleikamálini við atliti at dygdum og lýtum.

Lærarar skulu hava í huga, at tað helst krevur nakað av tíð, áðrenn næmingarnir gerast kunnigir við tey ymisku heitini, próvtølini og lopini millum próvtølini í nýggja próvtalsstiganum.

Eyðkent fyri nýggja prótvalsstigan er til dømis, at hann hevur færri próvtøl, og at ávís próvtøl fevna um størri øki enn áður. Tað merkir, at framtøkan hjá einum næmingi ikki altíð hevur við sær eitt hægri próvtal. Hóast ein næmingur leggur nógv fyri í arbeiðinum og tekur seg fram, er ikki vist, at tað er nóg mikið til, at próvtalið verður hækkað. Slík støða krevur, at lærari í sambandi við eftirmetingina, á annan hátt enn við próvtali, ger greitt fyri næminginum, at talan er um framtøku.

Tá ið próvtal verður givið, kann lærarin ímynda sær, at næmingurin kemur inn við 12-talinum á pannuni. Síðani skal lærarin, við støði í dygdum og lýtum, at kalla "flysa" løg av próvtølum omanav, til hann kemur til endaliga próvtalið.

Tá ið næmingurin verður kunnaður um próvtal, er umráðandi, at lærari og próvdómari kunnu grundgeva fyri próvtalinum við støði í teimum førleikamálum, sum lýst eru í námsætlanini. Lærari og próvdómari skulu duga at greiða næminginum frá, hvørjar dygdir og hvørji lýti hava havt týdning fyri, at næmingurin hevur fingið júst hetta próvtal. Í grundgevingini verða viðkomandi førleikamál umrødd, og greitt verður frá, hvat væntað verður, at næmingurin dugir á viðkomandi førleikastigi.

## At seta í verk

Uppgávan at seta í verk nýggja prótvalsstigan kann verða loyst á ymiskan hátt. Ein máti er at seta verksetingartoymi á skúlanum til at røkja hesa uppgávu. Toymið hevur ábyrgdina av at fyrireika, at kunna um, seta í gongd og skipa verksetingararbeiðið.

Tá ið farið verður undir at nýta prótvalsstigan, kann verksetingartoymið vera til taks at greiða ivamál og stuðla starvsfeløgum í at nýta stigan. Fyri at fáa so gott úrslit, sum til ber, er neyðugt at røkka øllum lærararum.

Umráðandi er, at allir lærarar duga at brúka prótvalsstigan í undirvísingini. Tí snýr tað seg um, at verksetingartoymið umhugsar og ger eina verksetingar- og kunningarætlan, sum fevnir um allar áhugabólkar. Tað eru lærarar, próvdómarar, metingardómarar, næmingar, arbeiðsgevarar og foreldur. Í verksetingararbeiðinum skulu tær lógar- og kunngerðarbroytingar, sum hava beinleiðis samband við nýggja prótvalsstigan, verða havdar í huga.

### Verksetingarætlan

Nýggjar avbjóðingar fylgja við prótvalsstiganum, og tí er av stórum týdningi, at skúlin ger eina ætlan fyri verksetingina.

Skúlin eigur í hesum sambandi at umhugsa:

I. Hvat endamálið er við nýggja prótvalsstiganum:

- ✓ Bakgrund, prótvalslýsingar, lop o.tíl.

II. Hvussu prótvalsstigin skal nýtast:

- ✓ Hvussu verða málini tulkað?

- ✓ Hvussu verða málini stigbend í mun til próvtølini?
- ✓ Hvussu fæst semja um metingarkrøv?
- ✓ Hvussu verður avrikið umrøtt og dømt?
- ✓ Hvussu verða royndirnar frá arbeiðinum at seta í verk savnaðar saman?

Niðanfyri er víst eitt dømi um, hvussu skúlin kann gera eina ætlan, sum er skipað eftir stigum (skúli, deild, lærugrein, næmingar) og tíðarskeiði. Í síðstu linju eru næmingar skrivaðir inn, tí eisini teir eru partur av verksetingini.

| AUGUST 2011 | 1. uppgáva | 2. uppgáva | 3. uppgáva | 4. uppgáva |
|---|---|---|---|---|
| | Kunning | --- | --- | Eftirmeting |
| Skúli | | | | |
| Deild | | | | |
| Útbúgving | | | | |
| Lærugrein | | | | |
| Næmingar | | | | |

Tá ið arbeitt verður við innihaldinum í verksetingarætlanini, kann verksetingartoym-ið til dømis hava í huga:

- ✓ at umrøða og møguliga viga førleika-málini
- ✓ at umrøða og viðgera metingarkrøv
- ✓ at gera uppgávur og spurningar til næmingar
- ✓ at gera leiðreglur fyri, hvussu uppgávurnar skulu dømast
- ✓ at viðgera uppgávusvar frá næmingum
- ✓ at fremja royndarpróvtøku
- ✓ at fremja ávegis eftirmetingar
- ✓ at umrøða samanhang millum ávegis og endaliga eftirmeting.

## Kunning

Kunningin er ein týðandi liður í verksetingini. Skúlin tryggjar, at kunningin eisini røkkur næmingum, foreldrum, próvdómarum, metingardómarum og teimum virkjum og fyritøkum, sum hava lærlingar í skúla. Ein partur av kunningini kann vera meira almennur og til gangs fyri øll, meðan ein annar partur av kunningini snýr seg um upplýsingar og møguligar venjingar, sum bert venda sær til ávísar útbúgvingar ella lærugreinar.

## Evnisdagur

Skúlin kann skipa fyri evnisdegi, har byrjað verður við felags framløgu og orðaskifti um almenn viðurskifti í sambandi við próvtalsstigan og námsætlanirnar. Luttakarar kunnu síðan verða bólkaðir í lærugreinabólkar, har teir arbeiða víðari við ymiskum viðkomandi tilfari.

Av stórum týdningi er, at lærarar og próvdómarar fáa høvi til at arbeiða við ítøkiligum uppgávum og hugsaðum dømum, sum eru viðkomandi fyri teirra lærugrein. Í hesum sambandi verður dentur lagdur á førleikamálini og dygdir og lýti í einum avriki.